

www.oljan.fo

**Jan Müller** 02 - 09 - 2012

# Størsta avbjóðingin er at menna Thor-flotan

Thor í Hósvík man vera ein av teimum føroysku fyritøkunum, sum hevur luttikið oftast á oljumessum í útlandinum. Og sjálvandi var fyritøkan umboðað á føroyska básinum í Stavanger aftur í ár. Vóru Gunnbjørn Joensen,stjóri og Per Gulklett, ráðgevi ikki á básinum fyri at vísa andlit og taka ímóti kundum, so møtti tú teimum aftur og aftur á tí risastóru messuni og oftast í samrøðu við umboð fyri útlendskar fyritøkur. Her er nokk at gera, og tú mást alla tíðina liggja framvið, hóast tú sjáldan skrivar undir avtalur á eini slíkari messu. Her ger tú forarbeiðið og fær tey neyðugu sambondini, sum so møguliga kunnu gerast til sáttmálar seinni, sigur Gunnbjørn Joensen, ið eisini heldur tað hevur týdning at vera saman við og læra hinar føroysku luttakararnar at kenna. Tað er eisini ein partur av netverkanini, sum ein ikki eigur at undirmeta. Vit hava møtt nýggjum kundum, men tað er ov tíðliga at siga nakað enn um, hvat hetta kann blíva til, sigur Gunnbjørn, sum kortini ikki hevur nakað at klaga um, tí øll teirra frálandaskip eru í drift í løtuni, í Vestur- og Eysturgrønlandi, í Norðsjónum, vestan fyri Hetland og í Angola, Tanzania og Gabon í Afrika. Hvør er annars størsta avbjóðingin hjá Thor spurdu vit Gunnbjørn Joensen? Tað er at menna flotan og koma út við nútímans skipum, ið eftirspurningur er eftir. Hetta tekur sjálvandi tíð og skal fyrireikast væl, men vit arbeiða alla tíðina við ymsum ætlanum. Eisini hitt føroyska frálandareiðaríið, Supply Service var við á oljumessuni í Stavanger. Føroyska ferðalagið kom aftur til Føroya leygardagin við Atlantic Airways. Mynd Gunnbjørn Joensen og Per Gulklett á føroyska básinum. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller